E - og tónleikurin

Jákup Magnussen, útvarpsmaður

Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?
– Nei! Men eg var hugtikin av, at ein næstringur meistraði klaverið væl.

Spælir tú nakað ljóðføri?
– Gittar til húsbrúk. Havi eisini fingið eitt lag útgivið.

Syngur tú undir brúsuni?
– Onkuntíð trívi eg í ein sang - helst vakran. Tað veldst um, hvussu góða tíð eg havi.

Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?
– Ja - og eg var eisini í orkestri, tá eg var 15. Men eg valdi tann dreymin frá, tá eg fór at leggja plátur á sum 16 ára gamal. DJ-lívið var nógv stuttligari. Og nógv minni bundið.

Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?
– Rættiliga nógv, men ikki alt. Tað týdningarmesta í lívinum er at elska og at njóta vakurleikan í lívnum. Eg eri takksamur fyri hvønn dag, sum eg fái til gávus.

Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?
– Eg veit tað ikki. Men eg eigi tær flestu fløgurnar, sum føroyingar hava givið út. Og plátur liggja eftir frá fyrr. So lat okkum bara siga 600.

Hvat er tín yndisfløga?
– On Stage hjá Rainbow (Dupultpláta). Hon hevur eins nógv uppá hjarta sum Made in Japan hjá Deep Purple og The Wall hjá Pink Floyd.

Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?
– Dansktoppen 1968.

Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?
– Is This The World We Created eftir Queen. Hann hevur onki álit á eitt vald, hægri enn ein sjálvur. Bara vónloysi. Og ein negativan grundtóna.

Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?
– Pínligt er eitt pínligt orð. Eg vil heldur siga tað soleiðis, at fleiri av countryplátunum á føroyskum máli við amerikonskum aksangi áttu at verið spældar inn av nýggjum.

Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?
– Nikita hjá Elton John. Ein ótrúliga inniligur sangur, ið umboðar langtan.

Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?
– Fjølbroytt løg eftir Kára P, Nat Kink Cole, Pink Floyd, Madonnu, Mark Knopfler, Frændur, Barbra Streisand, The Beatles Stones, og nógvar ymiskar blues tónleikarar, t.d. Stevie Ray Vaughn.

Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?
– Sgt. Peppers Lonely Hearts Club Band, The Beatles 1967. Hon er ein tann besta plátan, ið gjørd er.

Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?
– Nýggjur harður rokkur, ið tónleikararnir ikki megna at spæla. Presisjónin vantar, og úrslitið er sera rótut.

Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?
– Paradise City hjá Guns n' Roses.

Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?
– Gott nokk var eg júst komin úr vøgguni, men av einari ella aðrari orsøk minnist eg Hey Jude hjá The Beatles. Og lagið hevði við sær, at filmútgávan av Yellow Submarine gjørdist mín fyrsta pláta.

Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?
– Eg havi bara gjørt ein lidnan, Hesi Snýð á Vælskapt Brek fløguni, sum Aria-sangarin Jógvan Hansen syngur. Frá mær fær hann eitt 13 tal fyri sín dugnaskap. Lagið var eisini eitt tað mest spælda av hesi fløgu. So eg eri væl nøgdur.

Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?
– Tað leggi eg púrt onki í. Tey mugu gjarna spæla Silvur-brúðarvalsin, um tey hava hug til tað.

Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?
– Sum tannáringur upplivdi eg Ritchie Blackmore's Rainbow live á Wembley Arena í London. Tað var fantastiskt – ótrúligt. Síðani havi eg verið til nógvar konsertir, men Londonupplivingin stendur enn týðiligast í minninum.

Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?
– Sheryl Crow. "Hun er bara for lekkur".

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá:Durita Holm, Granada, Spania, durita75@hotmail.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

Teatralskar páskir

Tann flógva páskaluftin sitraði av spenningi, og meðan vísararnir á tí stóru kirkjuklokkuni nærkaðust midnátt, bleiv mannamúgvan meira og meira teskandi og væntandi. Tá tey tólv sløgini endiliga komu, slóknaðu øll gøtuljósini í gamla býarpartinum og teskanin tagnaði. Tað bleiv heilt kvirt tá ið stóru gomlu kirkjuhurðarnar fóru upp.

Einasta ljóð, sum hoyrdist, vóru tey djúpu, dunandi sløgini frá einari trummu innan úr kirkjuni. Á odda út gjøgnum teir arabisku durabogarnar, gingu seks kappaklæddir menn við andlitsfjalandi hettum, sum gingu høgt upp í ein spíss eins og Ku Kluks Klan hetturnar. Tað einasta sum var bert, vóru hendurnar, sum hildu longum stavum við kyndlum í endunum, og eyguni, sum hómaðust gjøgnum holini í hettuni.

Eg kykaði eftir ondini, tá teir fyrstu av hesum svørtu, kyndlaberandi Ku Kluks Klan útgávunum komu til sjóndar. Ein rættiliga óhugnalig sjón helt eg, men so við og við sum fleiri og fleiri av teimum komu út úr kirkjuni hvarv óhugnin, og tað hátíðarliga tók yvir. Eftir teir fyrstu seks kyndlaberararnir, kom trummuslárin, hareftir 180 kyndlaberarar afturat, ein risastórur, blóðugur Jesus hangandi á krossinum, borin av 40 monnum, og til seinast enn fleiri kyndlaberarar, menn við stórum krossum á bakinum og aðrir við tungum leinkjum um øklarnar.

Tað var deyðatøgn meðan gongan spakuliga sniglaði seg oman eftir tí smala steinsetta vegnum. Eldurin frá kyndlunum speglaðist í Darro ánni, sum rann so stillisliga niðanfyri vegin. Uppi á høvdini hinumegin ánna stóð gigantiska Alhambra við sínum túsundtals innskriftum úr Koranini og hugdi niður á tann doyggjandi Jesus.

Brádliga skar ein kvinnurødd gjøgnum kvirruna. Tann svartklædda kvinnan stóð á eini balkong á einum av teimum aldargomlu húsunum fram við vegnum, og júst tá Jesus var undir hennara balkong, sang hon við hásari, gremjandi rødd eina saeta. Klagusangurin fór gjøgnum mønu og merg; hon sang um móður Jesusar, og eg kendi ferilin av tí pínu sum Maria mátti líða yvir sín krossfesta son.

Á fleiri balkongum oman eftir Paseo de los tristes stóðu flamencosangarar og sungu, tá ið hin krossfesti kom framvið.

Í páskavikuni í Granada eru 40 slíkar gongur, hvør einstøk skipað av ymiskum átrúnaðarligum brøðralogum. Tey nýta øll tann eyðkenda, óhugnaliga kappan, men litirnir eru ymiskir, og gongurnar hava ymisk nøvn og evni sum hava at gera við páskirnar.

Hesi brøðraløgini vóru av fyrstan tíð stovnað av teimum ríku í 1600-talinum. Endamálið var at fremja hjálpararbeiði fyri tey illa støddu og at eggja til sterkari trúgv.

Gongurnar plagdu at steðga framman fyri fongslini, soleiðis at fangarnir kundu syngja eina saeta, og á tann hátt fáa luft fyri sínum skuldarkenslum og iðran. Seinni vóru tað ikki fangar, men yrkissangarar, saeteros, sum oftast vóru sigoynarar, sum sungu hesar kensluligu klagusangirnar, sum flest allir snúgva seg um Mariusa sorg og pínu.

Eingin ivi er um, at katolisisman er nógv meira teatralsk og kenslulig enn protestantisman. Kanska tær hvør í sínum lag passa væl til lyndi í Suðureuropa og Norðureuropa...

Størv á Føroya Læraraskúla frá 1. august 2003

Hevur tú hug at royna teg í einum mennandi námsfrøðiligum starvi í støðugari broyting, hava vit eina spennandi avbjóðing til tín á Føroya Læraraskúla.

Føroya Læraraskúli hevur til uppgávu at útbúgva lærarar og pedagogar. Útbúgvingin er skipað við fastari tímatalvu, sum við jøvnum millumbilum verður niðurløgd til frama fyri evnis- og verkætlanararbeiði.

Fyri rætta umsøkjaran, sum hevur formligan førleika í lýstu lærugreinunum, kann talan verða um fasta setan. Annars er talan um tímalærarastørv galdandi frá 1. august og alt skúlaárið. Tímarnir, sum leysir eru at søkja, eru í hesum lærugreinum:

Námsfrøði/undirvísingarlæra, námsfrøðilig sergrein: almenn námsfrøði/-undirvísingarlæra og námsfrøðiligur serlestur á læraraútbúgvingini, umleið **20** undirvísingartímar um vikuna.
Námsfrøði, stovns- og starvslæra: almenn og starvslig náms-/sernámsfrøði, stovnslæra, starvslæra og starvslæruleiðsla á pedagogútbúgvingini. Samlaða tímatalið (undirvísingartímar og starvsleiðslutímar) er umleið **20** um vikuna.
Støddfrøði: grundlærugreinin í 1. flokki á læraraútbúgvingini. **5** undirvísingartímar um vikuna.

Tey, ið sett verða í størvini, skulu hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni.

Viðkomandi skulu vera fús at samskipa útbúgvingarvirksemið í teirra lærugrein/-um við aðrar lærugreinar, m.a. í sambandi við evnisarbeiði og verkevni, og hava skyldu at luttaka í arbeiðsbólkum útbúgvingunum at frama og sum heild í øllum tiltøkum, sum sett verða í verk at menna útbúgvingarnar.

Eisini kunnu tey, ið sett verða, fáa møguleika at undirvísa á teimum eftirútbúgvingum, sum Læraraskúlin setur í verk.

Føst størv verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya, annars sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag .

Umsóknir skulu stílast til Mentamálaráðið, men sendast til Føroya Læraraskúla, Postsmoga 348, FO-110 Tórshavn, og vera skúlanum í hendi innan 15.mai 2003.

Setanin er galdandi frá 1. august 2003 og skúlaárið.

Tey, sum ynskja fleiri upplýsingar um størvini, eru væl komin at seta seg í samband við rektaran, ið er at hitta á tlf. 313501 ella á tlf. 225328 ella á telduposti paulini@flsk.fo og flsk@flsk.fo

Føroya Læraraskúli

Avloysari

Lastbilaførari og farmastøðsfólk

Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir avloysararum, sum lastbilførari/farmastøðsfólk til Farmastøðirnar kring landið, summari 2003.

Starvið fevnir um:
- Farmaflutning og farmaavgreiðslu
- Fylgja uppgávum, málsetningum o.ø. fyri farmastøðina
- Tryggja gott samstarv við kundar, myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

Førleikakrøv:
- Koyrikort til lastbil/trailara
- Trukkprógv
- Arbeiða sjálvstøðugt
- Góðan røkjuskap

Setanartreytir:
Løn- og setanartreytir verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknir:
Umsókn við avriti av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:
Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn
og skal vera fyritøkuni í hendi innan 8. mai 2003.
Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á Tel 343060 ella t-post: *hab@ssl.fo*.

REPROZ

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo

Nýtt skeið til motorsúkklukoyrikortið byrjar týsdagin 6. mai kl. 19.30

Føroya Koyriskúli

v/ **John Christiansen**, koyrilærari
Suðuroyarvegur 11 • FO-100 Tórshavn • Tel 21 47 75

SISORO 201800